# Frágreiðing um burðardygd

2025



# Fororð



Sum lívs- og pensjónstryggingarfelag hevur LÍV eina serliga ábyrgd. Okkara virksemi snýr seg um at skapa fíggjarligan tryggleika og stabilitet fyri kundar okkara langt fram í tíðina. Hetta langtíðarsjónarmið merkir eisini, at vit hava burðardygd í huga – bæði í okkara dagliga virksemi og í teimum íløgum, vit gera.

Hjá LÍV síggja vit burðardygd sum ein natúrligan part av okkara strategi og ábyrgd mótvegis kundum, starvsfólkum og føroyska samfelagnum. Hetta fevnir um at taka ábyrgd í mun til umhvørvi, at stuðla undir einum góðum og inkluderandi arbeiðsumhvørvi og at tryggja góða og ábyrgdarfulla leiðslu í felagnum.

Henda fyrsta frágreiðing um burðardygd hjá LÍV-samtakinum gevur eitt innlit í, hvussu vit arbeiða við burðardygd í LÍV. Frágreiðingin lýsir okkara arbeiði, mál og átøk innan umhvørvis-, sosial og leiðsluviðurskifti (ESG). Hon er ætlað kundum, starvsfólkum, myndugleikum og øðrum áhugapørtum, sum vilja hava innlit í arbeiðið hjá felagnum á hesum øki.

Seinastu árini hevur LÍV stigvíst styrkt hetta arbeiðið. Vit hava sett okkum greiðari mál og sett átøk í verk, sum millum annað fevna um ábyrgdarfullar íløgur, góða stýring og okkara leiklut í føroyska samfelagnum. Hetta arbeiðið verður framhaldandi ment saman við nýggjum krøvum, væntanum og okkara egnu málsetningum.

Vit eru errin av teimum stigum, sum longu eru tikin, men samstundis vita vit, at arbeiðið við burðardygd er ein tilgongd yvir langa tíð. Sum lívs- og pensjónstryggingarfelag við langtíðar málsetningum, vilja vit framhaldandi arbeiða fyri, at okkara virksemi stuðlar undir burðardygga menning – bæði fyri kundar okkara og fyri føroyska samfelagið.

Eg vóni, at hendan fyrsta frágreiðing um burðardygd hjá LÍV gevur tykkum innlit í, hvussu vit arbeiða á hesum týdningarmikla økinum. Góðan lesihug.

**Jan Jakobsen**
Stjóri, LÍV





# Innihaldsyvirlit


Fororð . . . 2
Um LÍV . . . 4
Stutt um frágreiðingina . . . 6
Søga . . . 7
Virkismyndil . . . 8
Karmar fyri arbeiðinum við burðardygd . . . 9
Okkara leiklutur sum ábyrgdarfullur íleggjari . . . 9
Samfelagsábyrgd . . . 10
Nýggj kós fram ímóti burðardyggum íløgum . . . 12
Umhvørvi . . . 13
Starvsfólk . . . 17
Leiðsla og ábyrgd . . . 20
ESG Lyklatøl . . . 23
Roknskaparreglur . . . 25
Váttan frá óheftum grannskoðara . . . 28

# Um LÍV

LÍV virkar í Føroyum, har høvuðsvirksemið er staðsett. Samstundis hevur felagið íløguvirksemi, sum fevnir um íløgur í Føroyum og á altjóða marknaðum. Høvuðsvirksemið er søla av lívstryggingum og eftirlønarskipanum, og LÍV umsitur stóran part av eftirlønaruppsparingini hjá føroyska arbeiðsmarknaðinum og hjá føroysku fakfeløgunum. Sum størsti veitari á eftirlønarmarknaðinum er LÍV samstarvsfelagin, ið tryggjar lívskorini hjá meirilutanum av føroyingum á ellisárum.

Okkara mál er at veita eina góða tænastu til fakfeløg, vinnufyritøkur og einstaklingar. Vit vilja vera fyrsta valið hjá føroyingum, tá tað snýr seg um at tekna eina persónstrygging og/ella at gera eina virðisgevandi uppsparing til eftirlønaraldur.

Í virksemi okkara síggja vit dagliga, at vit gera mun, og okkara málsetningur fyri komandi árini er framhaldandi at virka fyri eini munagóðari virðisøking til einstaka kundan.

Við góðari ráðgeving og kappingarførum tænastum, umsita vit í dag umleið 63% av kommersiella eftirlønarmarknaðinum í Føroyum. Hetta er eitt álit, sum okkara dugnaligu starvsfólk taka í størsta álvara.

## P/F Tryggingarfelagið LÍV

| | |
|---|---|
| Slag av fyritøku | Partafelag |
| NACE vinnuflokking | 65.11, 65.30 |
| Ársverk | 28,7 |
| Løntakarar | 34 |

| **Fíggjarstøða** | **2025** |
|---|---|
| Fíggjarjavni tDKK | 5.066.893 |
| Tryggingarinngjøld fyri egna rokning tDKK | 527.370 |
| Tryggingarinngjøld fyri egna rokning tEUR | 70.598 |

P/F Tryggingarfelagið LÍV umsitur tær tryggingar/eftirlønarskipanir í LÍV-samtakinum, sum eru teknaðar frá 1. januar 2000, og er felagið, sum umboðar høvuðsvirksemið í samtakinum.

## P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag

| | |
|---|---|
| Slag av fyritøku | Partafelag |
| NACE vinnuflokking | 65.11, 65.30 |

| **Fíggjarstøða** | **2025** |
|---|---|
| Fíggjarjavni tDKK | 1.921.522 |
| Tryggingarinngjøld fyri egna rokning tDKK | 32.526 |
| Tryggingarinngjøld fyri egna rokning tEUR | 4.354 |

P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag umsitur tær tryggingar/eftirlønarskipanir í LÍV-samtakinum, sum eru teknaðar fram til 1. januar 2000 og hava landskassaveðhald. Felagið teknar ikki nýggjar tryggingar, og er sostatt at meta sum eitt avtøkufelag.

# Fastognir og fastognir í gerð hjá LÍV-samtakinum

| Slag av fastogn | Staðseting | Matr.nr. | Tinglýstur eigari | Tinglýst vídd á grundøki (m2) | Veruligur ognarskapur hjá LÍV-samtakinum | Verandi/ vald hitaloysn |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skrivstovubygningur v/ íbúð | Kopargøta 1, 100 Tórshavn, Føroyar | 565 Tórshavn | Sp/f Óðinshædd 11 | 824 | 100% | Oljufýring |
| Sethús | Erlings jals gøta 3, 100 Tórshavn, Føroyar | 567 Tórshavn | Sp/f Óðinshædd 11 | 54 | 100% | Oljufýring |
| Íbúð | Weidekampsgade 67, 1. th., 2300 Kbh. S, Danmark | | P/F Tryggingarfelagið LÍV | n/d | 100% | Fjarhiti |
| Skrivstovubygningur | Óðinshædd 11, 100 Tórshavn, Føroyar | 1322h Tórshavn | Sp/f Óðinshædd 11 | 3732 | 100% | Luft til vatn hitapumpur |
| Íbúðarbygningur í gerð | Biskupstorg 19 og 21, 700 Klaksvík, Føroyar | 1645 Klaksvík | P/F LÍV Fastogn | n/d | 100% | Sjóhiti |
| Tríggir íbúðarbygningar í gerð | Glyvursvegur, 160 Argir, Føroyar | 256d Kirkjubø | P/F LÍV Fastogn | 3772 | 100% | Fjarhiti |
| Íbúðarbygningur í gerð | Fjøruvegur, 620 Runavík, Føroyar | 767a Runavík | P/F LÍV Fastogn | 593 | 100% | Luft til vatn hitapumpur |
| Vinnubygningar og tvey sethús | Magnus Heinasonar gøta 26, Sverrisgøta 16, Tórsgøta 13 og 15, 100 Tórshavn, Føroyar | 322 Tórshavn | Sp/f FR1 | 909 | 100% | Oljufýring |
| Íbúðar-/skrivstovubygningur | Magnus Heinasonar gøta 20, 100 Tórshavn, Føroyar | 321 Tórshavn | Sp/f FR1 | 171 | 100% | Oljufýring |
| Tveir íbúðarbygningar | Heimasta Horn 1-43, 100 Tórshavn, Føroyar | 1119a Tórshavn | P/F Heimasta Horn II | 4855 | 50% | Luft til vatn hitapumpur |
| Hotel | Staravegur 13, 100 Tórshavn, Føroyar | 1332e Tórshavn | P/F Ognarfelagið matr.nr. 1332e | 6993 | 60% | Fjarhiti |
| Sølumiðstøð | Tinghúsvegur 60 o.fl., 100 Tórshavn, Føroyar | 723h Tórshavn | P/F Fastogn | 11209 | 50% | Fjarhiti |
| Skrivstovubygningur | Tinghúsvegur 47, 100 Tórshavn, Føroyar | 751c Tórshavn | P/F Fastogn | 353 | 50% | Jarðhiti |
| Skrivstovubygningur | Staravegur 17, 100 Tórshavn, Føroyar | 1333e Tórshavn | P/F Fastogn | 1000 | 50% | Oljufýring |
| Skrivstovu-/handilsbygningur | Berjabrekka 1-5, 100 Tórshavn, Føroyar | 1464e Tórshavn | P/F Fastogn | 1360 | 50% | Fjarhiti |
| Skrivstovu-/handilsbygningur | Frúutrøð 2-4 o.fl., 100 Tórshavn, Føroyar | 645g Tórshavn | P/F Fastogn | 1680 | 50% | Oljufýring |
| Handilsbygningur | Niels Finsens gøta 8, 100 Tórshavn, Føroyar | 385 Tórshavn | P/F Fastogn | 427 | 50% | Oljufýring |
| Handilsbygningur | Á Hjalla 4, 188 Hoyvík, Føroyar | 1øl Hoyvík | P/F Fastogn | 3899 | 50% | Luft til luft hitapumpur |

Eingin fastogn, sum LÍV-samtakið eigur, leigar, ella hevur ræði á, liggjur á økjum, sum eru skrásett sum viðbrekin økir.

# Stutt um frágreiðingina

Hetta er fyrsta frágreiðing um burðardygd hjá LÍV-samtakinum. Hon er gjørd í samsvari við leiðreglur í VSME-standardinum (grund). VSME-standardurin, sum er útgivin av EFRAG (European Financial Reporting Advisory Group) er ein altjóða rammuskipan fyri burðardygdarfrágreiðingar hjá smáum og miðalstórum fyritøkum. Standardurin hevur til endamáls at geva fyritøkum eitt einfalt og skipað grundarlag at gera frágreiðing eftir.

Frágreiðingin er fyrireikað á samtaksstøði og fevnir um virksemið hjá P/F Tryggingarfelagið LÍV og P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag.

Endamálið við frágreiðingini er at skapa gjøgnumskygni um burðardygd hjá samtakinum.

## Bygnaðarligar avmarkingar

Tá ið LÍV verður umrøtt í dagligari talu, verður ofta sipað til virksemið hjá P/F Tryggingarfelagnum LÍV, umframt virksemið hjá P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag, sum P/F Tryggingarfelagið LÍV eigur, men Føroya Landsstýri hevur avgerandi ávirkan á.

P/F Tryggingarfelagið LÍV og P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag eru tvey løgfrøðiliga sjálvstøðug feløg við hvør sínari nevnd. Feløgini hava hvør sín samtaksroknskap (ársroknskap) av roknskaparligum og lógarbundnum orsøkum.

Hóast feløgini roknskaparliga verða viðgjørd sum hvør sín samtakseind, er í hesi burðardygdarfrágreiðing tó valt at leggja eina funktionella og rakstrarliga avmarking til grund. Tað merkir, at frágreiðingin fevnir um samlaða rakstrarvirksemið, sum í praksis verður útint felags av báðum feløgum. Grundarlagið fyri hesum er, at feløgini hava felags fyrisiting, og sostatt dagliga nýta somu hølir, KT skipanir, umsiting og starvsfólk. Mett verður, at hendan mannagongd gevur eina rættvísandi og gjøgnumskygda mynd av samlaða virkseminum og teimum útlátum, sum standast av hesum.

Tryggingarfelagið LÍV umboðar høvuðsvirksemið í samtakinum og er tí leiðandi í menning og útinning av burðardygdarátøkum, sum verða lýst í frágreiðingini.

Ávís viðurskifti, sum verða lýst í frágreiðingini – herundir ávís átøk innan íløguvirksemi – kunnu verða knýtt at einstøkum felag, og eru tí ikki neyðturviliga galdandi fyri allar partar av samtakinum. Tá ið orðið "felagið" í hesi frágreiðing verður nýtt, verður sostatt sipað til P/F Tryggingarfelagið LÍV. P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag er eitt minni felag í samtakinum og verður nevnt serstakt, tá ið tað er viðkomandi.

Frágreiðingin er góðkend av nevndunum í Tryggingarfelagnum LÍV og P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag.

## Rakstrarligar avmarkingar

Við ásetan av rakstrarligu avmarkingini er dentur lagdur á at fevna um tað, sum í veruleikanum myndar dagliga virksemið og felags rakstrargrundarlagið millum feløgini. Upplýsta orkunýtslan og beinleiðis og óbeinleiðis útlát (vav 1 og vav 2) stava frá egnum rakstri í P/F Tryggingarfelagnum LÍV og P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag.

Samtakið eigur harumframt fleiri feløg og ognir, sum eru partar av íløguvirksemi samtaksins. Ognarlutirnir í hesum feløgum eru kapitalíløgur, ið hava til endamáls at skapa avkast til pensjónskundarnar. Feløg og ognir, sum eru partur av íløguvirksemi – herundir fastognarfeløg, vindorkufeløg og onnur feløg, har samtakið eigur partar – verða ikki tikin við í uppgerðini fyri orkunýtslu og beinleiðis og óbeinleiðis útlát (vav 1 og vav 2), tí virksemið í hesum feløgum ikki er partur av egnum rakstri. Hesi verða í staðin viðgjørd sambært meginreglunum í GHG Protocol fyri fíggjarligar fyritøkur, har íløgur verða flokkaðar sum fíggjað útlát undir vav 3 (bólkur 15). Nærri frágreiðing um avmarking og dátudekning innan íløguøkið er lýst í kapitlinum um íløgur á síðu 15.



# Søga

Søgan hjá LÍV byrjar í 1966, tá Føroya Lívstrygging verður sett á stovn.

### 1966
Føroya Lívstrygging verður sett á stovn.

### 1998
Felagið fær egna stjórn og nevnd.

### 2000
Føroya Lívstrygging verður umskipað til partafelag.

### 2005
Tilgongdin at privatisera LÍV byrjar, og Ognarfelagið LÍV verður sett á stovn.

### 2009
P/F Tryggingarfelagið LÍV verður stovnað sum dótturfelag hjá P/F Føroya Lívstrygging, og hevur síðani tá í dagligari talu verið nevnt LÍV.

### 2012
Stórur partur av avtalunum í Tryggingarfelagnum LÍV verða umlagdar frá veitingartrygd til marknaðarrentu.

### 2014
Nýggj eftirlønarlóg kemur í gildi við bundnum eftirlønarinngjaldi.

### 2016
Ognarviðurskiftini verða skipaði av nýggjum í P/F LÍV Holding við tveimum dótturfeløgum: P/F Tryggingarfelagið LÍV og P/F LÍV Lívs- og pensjónstryggingarfelag. Ognarfelagið LÍV, umboðandi tryggingartakaran, fær tillutað 50% av partapeninginum, samstundis sum P/F Fakfelag keypir 33,33% av partapeninginum. 16,67% av partapeninginum eru framhaldandi ogn hjá Føroya Landsstýri.

### 2017
Fyrsta umboðsráðsvalið eftir yvirtøkuna verður hildið í januar 2017.

### 2020
P/F LÍV Holding og P/F Tryggingarfelagið LÍV verða løgd saman og halda fram sum P/F Tryggingarfelagið LÍV.

### 2023
P/F Fakfelag keypir ognarlutin hjá Føroya Landsstýri. Sostatt eigur P/F Fakfelag nú 50% og Ognarfelagið LÍV eigur 50% í P/F Tryggingarfelagnum LÍV.



Virkismyndil

# Kundin eigur LÍV

## - og hetta merkir, at vinningurin verður borin kundanum.

Ognarviðurskiftini byggja á eitt demokratiskt grundarlag, sum er stýrandi fyri mátan, felagið verður rikið.

### Íløgur og uppsparing

Sum íleggjari ynskja vit at eggja fyritøkum á eina burðardyggari leið umvegis ávirkan, tilval og frával. Málið er at skapa størst møguligt avkast á pensjónsuppsparingunum hjá kundum okkara. Hetta gera vit millum annað við ábyrgdarfullum og burðardyggum íløgum.

### Trygging

Ein pensjónsskipan hjá LÍV er meira enn bert ein uppsparing til ellisárini. Vit bjóða tryggingar, sum skulu veita fíggjarligt trygdarnet, um kundin gerst óarbeiðsførur, gerst hættisliga sjúkur ella fellur frá.

### Ráðgeving

Dygdargóð ráðgeving stuðlar undir, at kundar okkara kunnu taka røttu avgerðirnar. Ráðgevar okkara hjálpa tær ígjøgnum lívsins mongu broytingar, og lofta tær júst har, sum tú ert í lívinum.

### Virkisgrundarlag og trygd

Við sterkum fíggjarligum grundarlagi og ábyrgdarfullari leiðslu, vilja vit tryggja, at okkara kundar altíð hava eina trygga pensjón. Vit arbeiða burðardygt við greiðum etiskum reglum og málrættaðum denti á trygd.

### Heilsa

Góð heilsa er grundarlagið undir einari tryggari framtíð. Við okkara tryggingarvørum og samstørvum stuðla vit okkara kundum í at varðveita góða heilsu og fíggjarligan tryggleika – bæði í gerandisdegnum og tá óvæntaðir heilsutrupulleikar stinga seg upp.

# Karmar fyri arbeiðinum við burðardygd

Í LÍV eru vit tilvitaði um okkara skyldur og ábyrgdir innan burðardygd. Hetta inniber eitt nú, at vit halda okkum til meginreglurnar hjá ST fyri etiskar og burðardyggar íløgur (Principles for Responsible Investments). Málið er, at allar íløgur eru gjørdar í samsvari við ásetingarnar í ILO-sáttmálunum, sum áseta neyvar reglur í sambandi við barnaarbeiði og tvingsilsarbeiði, eins og reglur um javnstøðu og grundleggjandi arbeiðsrættindi.

Í 2024 gjørdist LÍV, saman við øðrum føroyskum fyritøkum, partur av netverkinum Varandi Vinna.

Netverkið virkar fyri, at fyritøkur kunnu samstarva um førleikamenning og um at skapa betri karmar fyri burðardygd. Málið er, at føroyskt vinnulív raðfestir burðardygd og arbeiðir á ábyrgdarfullan hátt, har bæði umhvørvisliga og sosiala tilfeingið verður gagnnýtt við skynsemi. Luttøkan í netverkinum hevur hjálpt LÍV við amboðum, vitanarbýti og við at seta mál.



# Okkara leiklutur sum ábyrgdarfullur íleggjari

Fígging og íløgur eru avgerandi fyri at fremja burðardygd, og ein partur av ábyrgdini av at tryggja, at peningastreymurin gongur rætta vegin liggur hjá privatum íleggjarum. Hjá LÍV snúgva ábyrgdarfullar íløgur seg um at skapa eitt høgt váðajusterað avkast, við virðing fyri samfelagsligum og fíggjarligum ábyrgdum.

Sum stovnsligur íleggjari og størsta føroyska pensjónsfelag, hava vit møguleika fyri at fremja og eggja til eina burðardygga broyting í samfelagnum umvegis íløguvirksemið. Høvuðsuppgávan er at tryggja eitt kappingarført avkast av pensjónsuppsparingini hjá kundum okkara, samstundis sum dentur verður lagdur á at halda umsitingarkostnaðirnar lágar. Harumframt arbeiða vit við at integrera burðardygdaratlit í íløguavgerðir, soleiðis at kapitalurin eisini kann stuðla undir eina burðardygga menning.

Í sambandi við veðurlagsráðstevnuna í skotska býnum Glasgow í november 2021, skrivaði Tryggingarfelagið LÍV undir eina tilsøgn um at økja um burðardyggar íløgur fram til 2030. Hesar íløgur taka serliga atlit til nr. 7 (burðardygg orka) og 13 (veðurlagsátøk) av heimsmálunum hjá ST. Í hesum sambandi hevur LÍV-samtakið givið tilsøgn um áhaldandi at arbeiða fyri at útbyggja íløgur innan serliga varandi orkukeldur innan vind og sólorku og at endurnýta burturkast á ein skilagóðan hátt.

Felagið hevur gjørt íløgur í fleiri verkætlanir innan grøna og varandi orku, sum taka útgangsstøði í ST heimsmálunum. Hesar íløgur eru bæði gjørdar í Føroyum og úti í heimi.






# Samfelagsábyrgd

### Íløgur í føroyska samfelagið

Eins og áður arbeiðir LÍV áhaldandi við, at ein partur av eftirlønaruppsparingini skal arbeiða í Føroyum. Við árslok 2025 hevur LÍV-samtakið gjørt íløgur í Føroyum fyri 1,1 mia.kr., sum svarar til umleið 16% av samlaðu íløguognunum. Harumframt eru játtaðar íløgur, sum ikki eru framdar enn.

Ein av stóru avbjóðingunum í Føroyum í dag er bústaðartrot og tørvur á fjølbroyttum bústaðarmøguleikum. Umvegis fastognarfelagið LÍV Fastogn, hevur felagið valt at gera íløgur í leigubústaðir, m.a við endamálinum at stuðla einum størri og fjølbroyttari bústaðaútboði, samstundis sum vit vilja veita eitt støðugt og gott avkast til limir okkara.




Vit hava lagt serligan dent á bygging av leigubústøðum, og raðfesta harumframt grønar og burðardyggar loysnir, so bústaðirnir ikki einans hjálpa í løtuni, men eisini stuðla einari langtíðar burðardyggari menning á føroyska bústaðamarknaðinum.

I fyrru hálvu av 2024 gjørdu vit avtalur um tvær nýggjar íbúðarverkætlanir. Talan er um 33 nýggjar íbúðir á Argjum og 31 nýggjar íbúðir í Klaksvík, umframt vinnulig handilshøli. Íbúðirnar væntast at verða klárar í 2026.

Í 2025 gjørdi LÍV Fastogn eisini avtalu um 18 nýggjar leiguíbúðir í miðbýarøkinum í Runavík, og er hetta sostatt triðja sjálvstøðuga íbúðarverkætlanin hjá LÍV Fastogn. Hetta stuðlar uppundir málið, um at hava bygt umleið 100 leiguíbúðir fram til summarið 2027.

Grundað á, at íløgurnar eru gjørdar fyri eftirlønaruppsparing hjá kundunum hjá LÍV, fáa hesir eisini framíhjárætt til íbúðirnar. Meira um hetta kann lesast á heimasíðuni www.livfastogn.fo.

Vit fegnast um, at vit eru vorðin ein aktivur partur av føroyska íbúðarmarknaðinum.

> "Endamálið hjá LÍV er at tryggja kundum okkara eina munagóða virðisøking av teirra eftirlønaruppsparing og at íløgurnar eisini skulu koma kundum okkara, og føroyska samfelagnum, til góðar. Vit meta tí, at tað passar væl inn í virkisøkið hjá okkum, at eftirlønaruppsparingarnar hjá kundum okkara, koma út at arbeiða í Føroyum og samstundis eru við til at loysa eina stóra samfelagsliga avbjóðing
>
> Jan Jakobsen, stjóri











# Íløga í vindorku

LÍV-samtakið eigur 60% av vindmyllufelagnum P/F Flatnahaga, sum rekur vindmyllulundina í Flatnahaga í Havn. Í 2023 byrjaðu vindmyllurnar hjá P/F Flatnahaga at framleiða varandi el-orku til allar føroyingar inn á netið hjá SEV.

Framleiðslan stuðlar undir grøna orkuskiftið í Føroyum og minkar $CO_2$-útlátið, samstundis sum hon økir partin av varandi orku í landinum.

Íløgan í Flatnahaga er vald, soleiðis at hon sameinir fíggjarligt virði við einum innbygdum umhvørvisendamáli. Verkætlanin tryggjar eitt væntað langtíðar avkast til kundarnar, stuðlar undir burðardygga samfelagsmenning og vísir á møguleikar fyri einum samstarvi millum føroyskar fyritøkur, hvat menning av grønum orkukeldum viðvíkur.

Íløgur av hesum slagnum eru partar av langtíðar íløguætlanini hjá LÍV. Hesar íløgur liggja í bólkinum fyri burðardyggar infrakervisverkætlanir og eru valdar út frá krøvum um væntað langtíðar avkasti, váðastýring og samfelagsog umhvørvisábyrgd.

# Nýggj kós fram ímóti burðardyggum íløgum

Sum partur av strategi felagsins, hevur felagið tikið stig til at stovna ein ESG-váðabólk, sum skal tryggja burðardyggar valmøguleikar í íløgurøktini av pensjóns-uppsparingini hjá okkara viðskiftafólkum.

Váðabólkar verða nýttir til at flokka íløgur eftir, hvussu stórur fíggjarligur váði er knýttur at teimum, og gera tað lættari at taka støðu til, hvørjar íløgur hóska til ymiskar kundar og pensjónsætlanir.

Við nýggja ESG-váðabólkinum vilja vit gera tað lættari fyri teg at seta tína pensión í íløgur við denti á burðardygdaratlit. Váðabólkurin byggir á eitt tilvitað val av íløgum í fyritøkur og verkætlanir, ið taka umhvørvis-, samfelags- og leiðsluábyrgd.

Íløgurnar í nýggja váðabólkinum innihalda sostatt bert íløgur, ið hava ESG-atlit, ella hava eitt beinleiðis burðardygt endamál.



# Umhvørvi

Sum partur av okkara burðardygdararbeiði, hava vit fyri fyrstu ferð gjørt eina samlaða uppgerð av okkara $CO_2$ útláti, grundað á leiðreglurnar í GHG Protocol Corporate Standard. Uppgerðin fevnir um bæði beinleiðis og óbeinleiðis útlát – frá egnum rakstri og frá keyptari orku (vav 1 og 2) – fyri árini 2022, 2023, 2024 og 2025. Frá 2024 hava vit harumframt gjørt fyrstu royndina at gera upp nøkur viðkomandi økir av okkara óbeinleiðis útláti í virðisketuni (Vav 3). Tað er týdningarmikið at viðmerkja, at útlátskeldurnar, sum eru uppgjørdar undir vav 3, ikki fevna um allar viðkomandi útlátskeldur knýttar at okkara virðisketu, men at tær umboða tey útlátini, sum vit hava eyðmerkt higartil.

Útlátsflokkarnir frá vav 3, sum higartil eru eyðmerktir í samsvari við GHG Protocol Corporate Standard, eru 3 út av 15 undirbólkum:

- Bólkur 6: Arbeiðsørindir
- Bólkur 7: Starvsfólkaferðing
- Bólkur 15: Íløgur (higartil avmarkað til skrásett altjóða partabrøv)

| Útlát | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| $CO_2e$ Vav 1 | $tCO_2e$ | 41 | 48 | 53 | 53 |
| $CO_2e$ Vav 2 | $tCO_2e$ | 28 | 21 | 24 | 23 |
| $CO_2e$-intensitetur (vav 1 og 2) | $tCO_2e$/mEUR | 0.9 | 1.1 | 1.3 | 1.3 |
| $CO_2e$ Vav 3 | | | | | |
| C6 - Arbeiðsørindir | $tCO_2e$ | 10 | 17 | n/d | n/d |
| C7 - Starvsfólkaferðing | $tCO_2e$ | 19 | 21 | n/d | n/d |
| C15 - Íløguvirksemi (altjóða partabrøv) | $tCO_2e$ | 6213 | n/d | n/d | n/d |

LÍV hevur higartil ikki sett kvantitativ mál fyri útlátini. Fyrsta stigið hevur verið at fáa greiðari innlit í, hvar okkara útlát stava frá, og hvussu vit kunnu arbeiða við at minka tey. Uppgerðin gevur okkum grundarlag fyri at seta mál og taka avgerðir, bæði í dagliga rakstrinum og innan íløguøkið.

Samstundis er hetta ein liður í einum longri arbeiði at styrkja gjøgnumskygni um burðardygd í samtakinum. LÍV arbeiðir fram ímóti at seta mál fyri ávís økir til næstu frágreiðing um burðardygd í 2026.

Av tí at hetta er fyrsta frágreiðingin, er enn ikki møguligt at samanbera øll tøl við undanfarin ár. Frágreiðingin skal tí síggjast sum eitt fyrsta grundarlag fyri framhaldandi uppfylging og menning. Arbeiðið við at kortleggja útlátini er ein týðandi fortreyt fyri at skilja, hvørji øki vit sjálvi kunnu ávirka, og hvar tað krevur samstarv við aðrar partar. Vit arbeiða nú víðari við at betra dátugrundarlagið, serliga fyri vav 3. Raðfestingin á hesum økinum verður komandi árini at taka fleiri undirbólkar við fyri vav 3 og at víðka um talið av íløgubólkum, sum innganga í útlátsuppgerðini fyri íløguvirksemið.






## Orkunýtsla og útlát

Virksemi okkara er tænastu- og ráðgevingargrundað, og tí hevur orkunýtslan frá rakstrinum í høvuðsheitum stavað frá upphiting av skrivstovubygningi okkara í Havn, sum í 2024 stóð fyri umleið 70% av samlaðu orkunýtsluni.

Í 2023 varð avgerð tikin um at byggja nýggjan orkuvinarligan skrivstovubygning á Óðinshædd í Havn. Nýggi bygningurin varð tikin í nýtslu í summar 2025 og avloysti tá gamla skrivstovubygningin, sum varð hitaður við olju. Nýggi bygningurin er útgjørdur við einari lufttil-vatn hitaskipan, og hevur harumframt betri bjálving og nútímans orkuloysnir.

Partar av 2025 vóru tó eyðkendar av, at bæði gamli og nýggi bygningurin vóru brúktir til egna nýtslu samstundis, tí flytingin fór fram stigvíst. Í hesum tíðarskeiði hevur orkunýtslan sostatt verið knýtt at báðum bygningum.

Skiftið frá oljufýring til hitapumpuskipan merkir, at beinleiðis $CO_2$-útlátið (Vav 1) frá upphiting væntandi fer at minka munandi ella fella heilt burtur í komandi árum, meðan ein størri partur av orkunýtsluni verður flokkaður sum keypt el-orka (Vav 2). Árið 2025 kann sostatt metast sum eitt umskiftisár, meðan tølini frá 2026 og frameftir vónandi koma at geva eina greiðari mynd av ávirkanini av, at høvuðssætið hjá LÍV er flutt í ein meira orkuvinarligan bygning.

$CO_2$-útlátið knýtt at el-nýtslu verður roknað í mun til nýtslu og er knýtt at samansetingini av orkukeldum á føroyska el-netinum. Hetta merkir, at útlátið í stóran mun er treytað av, hvussu streymframleiðslan hjá SEV er samansett til eina og hvørja tíð. Fyri at minka um útlátið er neyðugt, at útlatið av el-orkuframleiðslu í Føroyum og Danmark nærkast 0 g/kWh.

Burðardygg orka umboðaði 51% av el-orkuframleiðsluni hjá SEV í 2025.

$CO_2e$ intensiteturin vísir $CO_2e$ útlát fyri hvørja millión evrur í tryggingargjøldum ($tCO_2e$ / mEUR). Útrokningin vísir, at $CO_2e$ intensiteturin er lækkaður frá 2022 til 2025, og hetta er í høvuðsheitum grundað á hækkandi tryggingargjøld. Ein vøkstur í tryggingargjøldum kann hava stóra ávirkan á intensitetin, uttan at tað neyðturviliga endurspeglar eina samsvarandi broyting í teimum faktisku útlátunum.

$CO_2e$-intensiteturin eigur tí at tulkast saman við teimum absoluttu útlátunum fyri at fáa eina rættvísandi mynd av menningini.

### $CO_2e$-intensitetur (vav 1 og 2)

$tCO_2e$/mEUR



## Burturkast

Felagið hevur eitt avmarkað burturkast, sum stavar frá dagliga skrivstovuvirkseminum. Í frágreiðingarárinum hevur felagið ikki havt skipaða innsavning av hagtølum um mongd og samanseting av burturkasti. Tað hevur tí higartil ikki verið gjørligt at gera eina uppgerð av burturkastmongdum ella broytingum yvir tíð.

Felagið hevur tó sett í verk nøkur átøk fyri at minka burturkast og økja um skiljing av burturkasti. Millum annað verður burturkast nú skilt í fleiri bólkar, herundir papp/pappír, bleytt plast, glas, elektronikk, vandamikið burturkast og restburturkast. Samstundis er skipanin við einstøkum ruskspannum hjá hvørjum starvsfólki avtikin fyri at eggja til betri burturkastskiljing.

Í komandi árum ætlar felagið at arbeiða víðari við at fáa upp í lag skipanir, sum gera tað møguligt at savna inn hagtøl, soleiðis at ein uppgerð kann gerast av mongd og handfaring av burturkastøkinum.

## Íløgur

Tað framgongur greitt, at mest týðandi umhvørvis-ávirkanirnar hjá LÍV eru knýttar at fíggjaðu $CO_2$e-útlát-um í vavi 3, sum stava frá íløgugoymsluni.

Í stuttum er umhvørvisávirkanin tey $CO_2$ útlátini, ið LÍV eigur umvegis íløgurnar. Eigur LÍV t.d. 10% í eini fyritøku, eigur LÍV sostatt eisini samsvarandi partin av $CO_2$ útlátinum, sum fyritøkan útletur.

Útlátstøl hjá fyritøkunum verða býtt í tríggjar bólkar ella sokallaði vav. Hesi eru beinleiðis útlát (vav 1), óbein-leiðis útlát frá keyptari orku (vav 2), og aðrar óbeinleiðis útlátskeldur í virðisketuni (vav 3). Uppgerðin fyri útlát av íløguvirksemi í hesi frágreiðing fevnir um vav 1 og vav 2 útlát, og eru hesi útlát fevnd av uppgerðini fyri vav 3 hjá LÍV. Hagtølini verða veitt frá okkara norðurlendska dátu-veitara[SKS1.1][EL1.2], ið ger útlátsuppgerðina fyri skrásettar íløguognir.

Útlátsuppgerðin fyri íløguøkið er í hesi frágreiðing avmarkað til íløgubólkin "altjóða partabrøv". Uppgerðin av fíggjaðum útlátum fevnir í hesum umfari sostatt bert um ein part av íløgusamansetingini. Hetta kemst fyrst og fremst av avmarkaðum dátugrundarlagi, sum vit áhaldandi arbeiða fyri at betra, so uppgerðin kann fevna um ein størri part av íløgusamansetingini komandi árini.

Á yvirlitinum niðanfyri sæst, at valdi íløgubólkurin "altjóða partabrøv" umboðar 33% av íløguognunum hjá P/F Tryggingarfelagnum LÍV, og 45% av samlaðu íløguognunum hjá P/F LÍV lívs-og pensjónstrygging-arfelag.

Íløgubólkar, sum ikki eru tiknir við í uppgerðini, eru m.a. statslánsbrøv, útlán, óskrásett partabrøv, íløgur í fastogn, vinnulánsbrøv og aðrir íløgubólkar, har tað ikki hevur eydnast okkum at fingið $CO_2$ dátu til vega. Vit arbeiða við at kunna greina ein størri part av íløgugoymsluni, so at dátu-lýsingin kann gerast størri framyvir.

### Íløgusamanseting P/F Tryggingarfelagið LÍV
pr. 31.12.2025



**33%**
Altjóða partabrøv

### Íløgusamanseting P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag
pr. 31.12.2025



**45%**
Altjóða partabrøv

- Emerging markets ríkislánsbrøv
- High Yield lánsbrøv
- Kontant
- Hedgefonde
- Fastogn
- Infrakervi
- Óskrásett partabrøv
- Emerging markets partabrøv
- Altjóða partabrøv
- Investment Grade lánsbrøv
- Ríkis- og realkredittlánsbrøv

Frymilin $CO_2$-model for den finansielle sektor, sum Finans Danmark og Forsikring&Pension hava sett saman, er nýttur sum grundarlag fyri útlátsuppgerðini av altjóða partabrøvum. Myndilin byggir á aðalreglurnar í PCAF (Partnership for Carbon Accounting Financials), har útlátini verða býtt lutfalsliga samsvarandi partinum, sum íløgan umboðar av samlaða virðinum í einari fyritøku (EVIC).

$CO_2$-útrokningarnar taka støði í útlátsdátum, sum einstakar fyritøkur í íløgusamansetingini almannakunngera. Á altjóða støði eru greið tekin um, at talið av fyritøkum, ið upplýsa teirra útlát alment, veksur støðugt. Hetta førir við sær, at dátugrundarlagið, sum verður brúkt til útrokningarnar, kann væntast at gerast neyvari yvir tíð. Tí má havast í huga, at broytingar í absoluttum útlátstølum ikki neyðturviliga endurspegla broytingar í góðskuni av íløgunum – hækking kann t.d. koma av øktum íløguvirksemi ella størri dátugrundarlagi. Av somu orsøk, hava vit valt at upplýsa relativa $CO_2$-árinið ($CO_2$-útlát pr. millión kr. ílagdar), fyri betri at kunna samanbera útlátið av íløguvirksemi yvir tíð, umframt fyri betri at kunna samanbera okkum við onnur í vinnuni.



## $CO_2$e útlát frá íløgum í altjóða partabrøvum

| P/F Tryggingarfelagið LÍV | | | Fíggjað $CO_2$e | $CO_2$e-fótaspor | Dátugrundarlag | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | Marknaðarvirði (mió. kr.) | % av íløgusamansetingini við datadekningi | $tCO_2$e (vav 1 og 2) | $tCO_2$e (vav 1 og 2) pr. mió. kr. ílagdar | Rapporterað | Rapporterað/ Mett | Mett |
| 2025 | 1.662 | 98% | 4.055 | 2.44 | 72% | 12% | 16% |

| P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag | | | Fíggjað $CO_2$e | $CO_2$e-fótaspor | Dátugrundarlag | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár | Marknaðarvirði (mió. kr.) | % av íløgusamansetingini við datadekningi | $tCO_2$e (vav 1 og 2) | $tCO_2$e (vav 1 og 2) pr. mió. kr. ílagdar | Rapporterað | Rapporterað/ Mett | Mett |
| 2025 | 852 | 100% | 2.158 | 2.53 | 71% | 11% | 17% |

# Starvsfólk

Starvsfólkini eru grundarsteinurin undir dagliga virksemi okkara. Tey eru týdningarmesta tilfeingi, og tað eru tey sum tryggja, at vit kunnu veita dygdargóða tænastu og ráðgeving hvønn dag. Tí leggja vit stóran dent á at hava eitt gott og virðiligt arbeiðsumhvørvi.

Starvsaldur kann verða ein ábending um trivnað og støðufesti á arbeiðsplássinum. Í LÍV er starvsaldurin sum heild høgur, og í 2025 hava 59% av starvsfólkunum starvast í felagnum í 10 ár ella meira, og tað fegnast vit um. Starvsaldur er tó ikki einasta mátitali uppá trivnað, og tí er ætlanin at gera eina starvsfólka-nøgdsemiskanning í 2026.

## ArbeiðsLÍV

Vit vilja skapa karmar, sum stuðla undir arbeiðsgleði og góðari javnvág millum arbeiði og frítíð. Vit vita, at arbeiðsgleði og ein sunn javnvág millum arbeiði og frítíð hevur stóran týdning fyri trivnaðin, og ikki minst dygdina á arbeiðinum.

Tí leggja vit okkum eftir at verða eitt arbeiðspláss, har tað ber til at laga arbeiðið eftir privatlívinum, og ikki bert øvugt.

Hjá okkum er møguligt at arbeiða niðursetta tíð, um tað hóskar til lívsstøðuna hjá tí einstaka. Í samráð við nærmasta leiðara verður avtalað, hvussu arbeiðið best verður skipað, soleiðis at arbeiðslív, familjulív og frítíðarlív ganga hond í hond. Eisini vilja vit tryggja, at hvør einstakur verður hoyrdur og sæddur, og tí hava starvsfólkini árligar menningarsamrøður við nærmasta leiðara, har m.a. trivnaður og menning verða viðgjørd.

Vit miða eftir at hava javnt aldursbýti og ynskja at leggja lunnar undir gott samstarv millum eldri og yngri starvsfólk. Vit stuðla fýsni og eldhuga hjá starvsfólkunum og virka fyri persónligari og fakligari menning alt arbeiðslívið. Skipað verður so fyri, at yngru starvsfólkini fáa høvi at læra av royndum og vitan hjá eldri starvsfólkum.

Eisini hava vit ein eldrapolitikk, sum hevur til endamáls at stuðla undir trivnaði hjá starvsfólkum í seinasta parti av arbeiðslívinum, tað vil siga frá umleið 60 ára aldri, tá farið kann verða undir at leggja eldraárini til rættis. Í 2025 bjóðaði LÍV starvsfólkum, sum nærkast pensjónsaldri, at luttaka á skeiði um fyrireiking til arbeiðsfría lívið.

### Hægsti starvsaldur í 2025 var 48 ár

Starvsaldur 10 ár ella hægri: 20 starvsfólk
Starvsaldur 25 ár ella hægri: 10 starvsfólk

### Aldursbýtið í starvsfólkahópinum




### Kynsbýti








## Førleikamenning

Regluliga verða næmingar settir, sum fáa høvi at royna seg í praksis og menna sínar førleikar. Fleiri av fyrrverandi næmingum okkara hava hildið fram í felagnum og útbygt starvsleiðina hjá okkum, og hetta fegnast vit um.

Í frágreiðingarárinum gjørdust tveir næmingar útlærdir sum tryggingaratstøðingar.

Eisini hava trý starvsfólk verið undir hægri lesnaði við síðuna av starvinum í 2025. Vit meta, tað vera ein styrki, tá starvsfólk menna seg fakliga, og vit stuðla fegin víðari útbúgving og førleikamenning, sum styrkir felagið í síni heild.

Í hesum sambandi eru vit sinnað at leggja arbeiðið til rættis á ein hátt, sum ger tað lættari hjá starvsfólkum at sameina arbeiði og lesnað. Hetta kann millum annað fevna um tillaging av arbeiðstíð, og brúk av viðkomandi fasilitetum í sambandi við lesnaðin.

LÍV arbeiðir fyri at skapa eitt inkluderandi arbeiðsumhvørvi, og í hesum sambandi hevur felagið millum annað stuðlað starvsfólkum við øðrum málsligum bakgrundum í at taka málskeið í føroyskum.

## Tiltøk

Í 2025 hava vit luttikið á fleiri tiltøkum, sum hava til endamáls at varpa ljós á yrkismøguleikar. M.a. luttóku vit á Vinnan Vitjar á Glasi og á Miðnámi á Kambsdali, har vit fingu høvi at hitta miðnámsskúlanæmingar og greiða teimum frá, hvussu ein arbeiðsdagur hjá okkum kann síggja út, og hvørjar útbúgvingarleiðir kunnu leiða til starv innan okkara øki.

Í árinum hevur LÍV Fastogn eisini skipað fyri kunningartiltøkum um bústaðarverkætlanir. Kunningartiltøkini vóru hildin í Klaksvík og í Tórshavn.

Í 2024 vóru vit eisini við á Jobmatch, har vit greiddu áhugaðum frá okkara arbeiði og starvsmøguleikum.







Á okkara intraneti eru mannagongdir og kunning, sum hava til endamáls at stuðla undir einum tryggum og væl skipaðum arbeiðsumhvørvi.

Ein partur av arbeiðinum inniber viðgerð av persónsupplýsingum, og tískil skal LÍV syrgja fyri, at øll starvsfólk hava neyðugan kunnleika til dátuverndarlógina, sum okkum er áløgd at halda. Í hesum sambandi verður javnan skipað fyri kunning, har ljós verður varpað á KT-trygd og persóndátuvernd.

Eisini hava vit politikkir, sum miða eftir at fyribyrgja og loysa mál um m.a. happing og kynsligan ágang. Hesir politikkir tilskila greiðar mannagongdir fyri, hvussu slík mál skulu handfarast og tryggja, at øll starvsfólk kenna síni rættindi og skyldur.

Við hesum vilja vit skapa karmar, sum stuðla undir ein tryggan og virðiligan arbeiðsdag fyri øll.

Vit bjóða starvsfólkum okkara regluliga skeið í fyrstuhjálp, og hjartastartari er tøkur í bygninginum og er skrásettur á www.hjartastartari.fo, og kann sostatt eisini nýtast, um ein persónur í nánd kemur í neyð.

# Merkisdagar í 2025



Sunneva Jakobsen hevur starvast hjá LÍV í 40 ár, og Óli Mortensen hevur starvast hjá LÍV í 10 ár.

Silja Elisabet Jacobsen og Dánjal á Krákusteini gjørdust útlærdir tryggingaratstøðingar.





Emma Johannesen og Annleyg Hansen hava starvast hjá LÍV í 10 ár.

Harafturat hevur Arngerð Diana Hansen starvast hjá LÍV í 25 ár.

# Leiðsla og ábyrgd

Góð leiðsla er grundleggjandi fyri LÍV sum fíggjarligan aktør. Hetta er ein fortreyt fyri at kunna liva upp til skyldurnar mótvegis kundum, starvsfólkum, samstarvspørtum og samfelagnum sum heild. Meginreglur og arbeiðsgongdir, sum tryggja, at felagið arbeiðir ábyrgdarfult, gjøgnumskygt og effektivt, eru ein týðandi partur av rakstrinum. Somuleiðis eru hesir karmar avgerandi í arbeiðinum við at tryggja virðið av íløgum okkara til gagns fyri pensjónskundarnar.

Evsta ábyrgdin fyri leiðslu og strategi felagsins liggur hjá nevndini, sum hevur eftirlit við virkseminum hjá felagnum og tryggjar, at felagið verður rikið á ein ábyrgdarfullan og fíggjarliga haldgóðan hátt í samsvari við lógir og góðan leiðslusið. Dagliga leiðslan hevur ábyrgd av rakstrinum og fyri at seta strategi og mál í verk.

Nevndin hevur samtykt ein politikk fyri fjølbroytni í nevndini, sum m.a. ásetir hvørjar førleikar og royndir eru viðkomandi at leggja dent á, tá ið nevndarlimir verða valdir.

## Atferð og virkismentan

Virkismentanin á LÍV tekur útgangsstøði í felagsins málsetningum, visjón, missión og virðum. Endamálið sum kundaátt felag er at geva aftur til kundan. Hetta sæst aftur í málsetninginum um at vera fyrsta valið hjá føroyingum, tá tað snýr seg um at tekna eina pensjónstrygging og/ella at gera eina virðisgevandi uppsparing til eftirlønaraldur.

Grundarlagið undir virkismentanini hjá LÍV er eitt trygt og mennandi arbeiðsumhvørvi við greiðum etiskum karmum fyri atburðin hjá starvsfólkum. Hesir eru lýstir í starvsfólkahondbókini, sum er knýtt at arbeiðsavtaluni hjá starvsfólkunum.

## Lønarpolitikkur

LÍV hevur sum meginreglu at skapa størst møgulig virðir fyri kundarnar við best møguligum fíggjaravkasti og við minst møguligum umsitingarkostnaði. Við hesum í huga hevur leiðslan lagt til rættis ein lønarpolitikk, sum skal tryggja, at leiðsla og starvsfólk verða lønt á ein slíkan hátt, at fyritøkunnar handilsligu og langtíðar strategisku mál verða stuðlað á best møguligan hátt.

Lønarviðurskiftini avspegla og styðja uppundir, at LÍV støðugt megnar at rekruttera og halda fast í einari dugnaligari og ábyrgdarfullari leiðslu, sum fremur eina sunna og virkna váðastýring og ikki eggjar til at taka ov stórar váðar.

LÍV hevur ikki lønarskipanir, sum hava áeggjan til at átaka óneyðugar váðar.







## ESG politikkur

Íløgurnar eru spjaddar yvir nógv lond, vinnur og íløgubólkar. Felags fyri allar íløgurnar er ESG-politikkurin, sum nevndirnar í samtakinum hava samtykt fyri íløguøkið. Menningin av ESG-politikkinum er ein leypandi tilgongd, tí at økið er undir støðugari menning. Við at miða eftir eini ábyrgdarfullari tilgongd at reka virksemið, og samstundis at vera viðkomandi og í eygnahædd við áhugapartar hjá LÍV, verður vavið í ESG-politikkinum regluliga eftirmett.

Politikkurin fevnir um uttanhýsis umsitnar heimildir og skrásett virðisbrøv, har fylgjandi fýra meginreglur eru galdandi:

1. Allar felagsins íløgur í skrásett virðisbrøv verða gjørdar við atliti at altjóða viðurkendum meginreglum fyri ábyrgdarfullar íløgur. LÍV krevur sostatt, at allar heimildir skulu fylgja meginreglunum, ið eru lýstar í Meginreglum hjá Sameindu Tjóðum fyri Ábyrgdarfullar Íløgur (UN PRI). Tær seks meginreglurnar eru:

    1) Vit skulu taka ESG-viðurskifti við í íløgugreiningum og avgerðartilgongdum.

    2) Vit skulu vera virknir íleggjarar og taka ESG-viðurskifti við í okkara íløgupolitikk- og praksis.

    3) Vit skulu virka fyri nøktandi gjøgnumskygni um ESG-viðurskifti frá teimum feløgum, vit gera íløgur í.

    4) Vit skulu virka fyri góðtøku og verksetan av meginreglunum í íløgugeiranum.

    5) Vit skulu samstarva við onnur um at betra virkni okkara í sambandi við verksetanina av meginreglunum.

    6) Vit skulu regluliga kunna um, hvussu vit fremja meginreglurnar og hvørja framgongd vit hava gjørt.

2. Íløgur verða ikki gjørdar í fyritøkur, sum hava inntøku frá framleiðslu ella sølu av umstríddum vápnum.

3. Íløgur verða ikki gjørdar í fyritøkur, sum hava ein týðandi part av inntøkuni frá framleiðslu av termiskum koli.

4. Fyri uttanhýsis umsitnum heimildum, verða krøv sett um, at ESG-atlit verða integrerað í íløgutilgongdini, herundir frágreiðing um útinnan av virknari eigarastýring.

Í verki verður hetta tryggjað við, at uttanhýsis íløgurøktarar binda seg til at liva upp til og fylgja hesum meginreglum í fyrisitingini av heimildunum hjá LÍV, og at greiða frá hesum sum ein natúrligan part av vanligu frágreiðingini. Íløgurøktarar sum ikki virka í samsvari við meginreglurnar, skulu skiftast út.

## 2025 - 2027

# Strategiskir málsetningar

Fyri at vera kappingarfør á marknaðinum, og fyri at møta okkara kundum og teirra væntanum hava vit ásett nakrar strategiskar ætlanir fyri 2025-2027.

Fyri at náa hesum strategisku ætlanum hava vit sett nøkur lyklapunkt sum stuðla uppundir hesa ætlan komandi árini.



**Kostnaðarprosent av árligum inngjaldi**




### Avkast

Avkastið skal liggja í minsta lagi á hædd við miðalavkastið hjá donsku eftirlønarfeløgunum.

### Kostnaðarstøði

Felagið skal hava kappingarført kostnaðarstøði.

### Kundasamskifti

Felagið skal hava eitt tætt og opið samskifti við viðskiftafólkini.

### Kundaátøk // marknaðarátøk

- Styrkja heimasíðu & kundaportal.
- Fokus á tiltøk fyri fakfeløg og umsitingar.
- Sjónligari í 2025.

### Kundaátøk // ráðgeving // søla

- Málini eru at økja sølu.
- Førleikamenna starvsfólk.
- Átøk sum stuðla uppundir sølu v.m.

Vit síggja fram til hesi árini, har vit halda fram við at skapa virði fyri okkara kundar. Við dent á burðardyggan vøkstur, effektivisering av kostnaði og styrktum samskifti við kundar okkara.

**Við hesum tryggja vit, at felagið verður væl fyrireikað til komandi avbjóðingar og møguleikar.**

# ESG Lyklatøl

| | Eind | VSME nr. | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útlát** | | | | | | |
| $CO_2$e Vav 1 | $tCO_2e$ | B3-30 | 41 | 48 | 53 | 53 |
| $CO_2$e Vav 2 | $tCO_2e$ | B3-30 | 28 | 21 | 24 | 23 |
| $CO_2$e-intensitetur (vav 1 og 2) | $tCO_2e$/mEUR | B3-31 | 0.9 | 1.1 | 1.3 | 1.3 |
| $CO_2$e Vav 3 | | | | | | |
| C6 - Arbeiðsørindir | $tCO_2e$ | NR | 10 | 17 | n/d | n/d |
| C7 - Starvsfólkaferðing | $tCO_2e$ | NR | 19 | 21 | n/d | n/d |
| C15 - Íløguvirksemi (altjóða partabrøv) | $tCO_2e$ | NR | 6213 | n/d | n/d | n/d |
| **Orkunýtsla** | | | | | | |
| Fossil brennievni | MWh | B3-29 | 154 | 179 | 199 | 197 |
| Varandi brennievni | MWh | B3-29 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Elnýtsla (keypt) | MWh | B3-29 | 83 | 70 | 69 | 69 |
| Varandi elnýtsla | MWh | B3-29 | 43 | 40 | 35 | 37 |
| Fjarhitanýtsla | MWh | B3-29 | 8 | 7 | 7 | 5 |
| Varandi fjarhitanýtsla | MWh | B3-29 | 7 | 6 | 6 | 5 |
| Samlað orkunýtsla | MWh | B3-29 | 245 | 257 | 275 | 271 |
| Varandi orka | % | B3-29 | 20% | 18% | 15% | 15% |
| **Umhvørvisávirkan** [1] | | | | | | |
| Dálking (hav, vatn og jørð) | | B3 | n/a | n/a | n/a | n/a |
| Lívmargfeldi | | B4 | n/a | n/a | n/a | n/a |
| Vatnnýtsla | | B5 | n/a | n/a | n/a | n/a |
| Ringbúskapur, burturkastviðgerð og tilfarsnýtsla | | B6 | n/d | n/d | n/d | n/d |

| | Eind | VSME nr. | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Starvsfólkahópur** | | | | | | |
| Ársverk | FTE | B8-39 | 28.6 | 31.6 | 27.9 | 27.0 |
| Løntakarar | Stk | B8-39 | 34 | 36 | 35 | 31 |
| Fyribils starvsfólk | Stk | B8-39a | 0 | 0 | n/d | n/d |
| Fastsett starvsfólk | Stk | B8-39a | 34 | 36 | n/d | n/d |
| Lærlingar | Stk | NR | 2 | 2 | 2 | 0 |
| Starvsfólkaskifti | % | B8-40 | 9% | 8% | 0% | 6% |
| **Kynsbýti** | | | | | | |
| Kynsbýti (K) | % | B8-39b | 65% | 67% | 69% | 71% |
| Løntakarar - kvinnur | Stk | B8-39b | 22 | 24 | 24 | 22 |
| Løntakarar - menn | Stk | B8-39b | 12 | 12 | 11 | 9 |
| Lønarmunur millum kyn | % | B10-42b | 29% | n/d | n/d | n/d |
| Lønarmunur millum kyn eksl. leiðslu | % | NR | 25% | n/d | n/d | n/d |
| Lønarmunur millum kyn (median) | Ferðir | NR | 1.2 | n/d | n/d | n/d |
| **Trygd og heilsa** | | | | | | |
| Skrásett arbeiðsóhapp | Stk | B9-41a | 0 | 0 | 1 | 0 |
| Frekvensur av arbeiðsóhappum | Skaðar pr. 100 FTE | B9-41a | 0 | 0 | 3.6 | 0 |
| Deyðsfall orsaka av arbeiðsóhappi | Stk | B9-41b | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Sjúkrafrávera | Dagar/FTE | NR | 8.5 | 9.2 | 12.3 | n/d |

[1] LÍV hevur ikki framleiðsluvirksemi, og tí er beinleiðis ávirkan á dálking av havi, vatni og jørð avmarkað. LÍV hevur tí ikki eyðmerkt dálkingarkeldur í hesi frágreiðing.

Møgulig ávirkan á lívmargfeldi er fyrst og fremst óbeinleiðis umvegis íløguvirksemi. Í hesi frágreiðing er arbeiðið við fíggjaðum útlátum framvegis avmarkað, og lívmargfeldi er tí ikki kvantitativt uppgjørt enn. Tó kann viðmerkjast, at eingin fastogn, sum LÍV-samtakið eigur, leigar, ella hevur ræði á, liggur á økjum, sum eru skrásett sum viðbrekin øki.

Grundleisturin í VSME mælir til, at feløg upplýsa vatnnýtsluna, men vegna vantandi tøl á hesum øki, eru vit ikki før fyri at lúka tær treytirnar enn.

| | Eind | VSME nr. | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rættindi** | | | | | | |
| Øll starvsfólk fáa eina løn, sum í minsta lagi er á støði við minstulønina | JA/NEI | B10-42a | JA | JA | n/d | n/d |
| Miðal útbúgvingartímar - pr. løntakara | Tímar / løntakarar | B10-42d | 11 | 26 | n/d | n/d |
| Miðal útbúgvingartímar - menn | Tímar / mannligir løntakarar | B10-42d | 8 | 24 | n/d | n/d |
| Miðal útbúgvingartímar - kvinnur | Tímar / kvinnuligir løntakarar | B10-42d | 13 | 27 | n/d | n/d |
| Starvsfólk umfevnd av kollektivum sáttmála | % | B10-42c | 100% | 100% | n/d | n/d |
| **Leiðsla** | | | | | | |
| **Kynsbýti í leiðslu (K)** | % | NR | 50% | 50% | 50% | 50% |
| Dómar innan korruptión og mutur | Stk | B11-43 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Samlað upphædd fyri bøtur fyri korruptión og mutur | kr. | B11-43 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Kynsbýti í nevnd (K)** | | | | | | |
| P/F Tryggingarfelagið LÍV | % | NR | 20% | 20% | 20% | 20% |
| P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag | % | NR | 20% | 20% | 20% | 20% |
| **Uppmøting til nevndarfundir** | | | | | | |
| P/F Tryggingarfelagið LÍV | % | NR | 97% | 92% | 98% | 96% |
| P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag | % | NR | 89% | 93% | 90% | 89% |



# Roknskaparreglur

## $CO_2$e VAV 1

Hetta er beinleiðis útlát frá forbrenningini av brennievnum og tilfari. Sum oftast er $CO_2$e ikki mált, men útroknað, hetta er grundað á mát frá brúktum tilfari, t.e. olju, gass, diesel, bensin og øðrum. Mongdin av brendum brennievni/tilfari er faldað við umformarum fyri útlát av teimum 7 Kyoto-gassunum: ($CO_2$e), (CH4), (N2O), (HFC), (PFC), (SF2) og (NF3). Hesi vakstrarhúsgass hava ymiska ávirkan á altjóða upphitingina og verða tískil normaliserað til $CO_2$ líknandi útlát ($CO_2$e) við at falda hetta við teirra individuella GWP faktor.

Frymil: Oljunýtsla (L) * útlátsfaktorar

Verður roknað við føroyska $CO_2$-roknaranum.

## $CO_2$e VAV 2

Óbeinleiðis útlat frá orku til at framleiða ravmagn ella fjarhita, sum fyritøkan hevur keypt til sína nýtslu. Vav 2 útlát eru sum meginregla útroknað á sama hátt sum Vav 1 útlát, tó verða vanliga ikki øll Kyoto-gass tikin við.

Í Føroyum verður ravmagn framleitt av SEV, so tann sami umrokningarfaktorur (samsvarandi býti av varandi orkukeldum fyri frásagnarárið) verður nýttur til allar fyritøkur, ið keypa ravmagn frá SEV.

Vav 2 útlát verður útroknað fyri hvønn keyptan MWh av ravmagni, og/ ella av fjarhita.

Frymil: [(Elnýtsla * útlátsfaktorur) + (Fjarhitanýtsla * útlátsfaktorur)]

Verður roknað við føroyska $CO_2$-roknaranum.

## $CO_2$e VAV 3

Vav 3 útlát kemur frá øðrum óbeinleiðis virksemi, sum ein fyritøka hevur. Útlátið kemur frá keldum, ið fyritøkan ikki eigur ella hevur beinleiðis ræði á.

Uppgerðin av $CO_2$e - Vav 3 er gjørd eftir GHG Protocol Corporate Standard, sum hevur allýst 15 undirbólkar. Vit hava ikki gjørt útlátið upp fyri allar undirbólkarnar, annaðhvørt tí at dátugrundarlagið hevur manglað, ella tí at undirbólkarnir ikki eru viðkomandi fyri virksemið hjá LÍV. Undirbólkarnir, sum eru valdir í fyrsta umfarið, eru lýstir niðanfyri.

### C6 - Arbeiðsørindir

Tal av kilometrum í sambandi við ferðing uttanlands í arbeiðsørindum, býtt á viðkomandi ferðahættir og umroknað til útlát av tonsum $CO_2$e. Mátipunktið fevnir ikki um privata ferðing hjá starvsfólkum til og frá arbeiði. Hetta verður roknað við føroyska $CO_2$-roknaranum.

### C7 - Starvsfólkaferðing

Tal av kilometrum í sambandi við ferðing millum bústað og arbeiðsstað, býtt á viðkomandi ferðahættir

og umroknað til útlát av tonsum $CO_2$. Hetta verður roknað við føroyska $CO_2$-roknaranum.

**C15 - Íløgur**

Fevnir um absolutt og relativt útlát fíggjað umvegis íløgurnar í samtakinum. Íløgubólkurin, sum eru fevndur av lyklatalinum, er skrásett altjóða partabrøv. Hesin íløgubólkurin umboðar 33% av íløguognum hjá P/F Tryggingarfelagnum LÍV, og 45% av samlaðu íløguognunum hjá P/F LÍV lívs-og pensjónstrygging-arfelag. Aðrir partar av íløgusamansetingini verða sostatt ikki íroknaðir. LÍV hevur higartil ikki nøktandi dátugrundarlag fyri aðrar íløgubólkar, men arbeiðir áhaldandi við hesum.

Frymilin $CO_2$-model for den finansielle sektor frá 2. november 2020, sum Finans Danmark og Forsikring & Pension hava sett saman, er nýttur sum grundarlag fyri útlátsuppgerðini av altjóða partabrøvum. Myndilin byggir á aðalreglurnar í PCAF (Partnership for Carbon Accounting Financials), har útlátini verða býtt lutfalsliga samsvarandi partinum, sum íløgan umboðar av samlaða virðinum í einari fyritøku (EVIC).

Uppgerðin fevnir um vav 1 og vav 2 útlát, og hagtølini verða veitt frá okkara norðurlendska dátuveitara, ið ger útlátsuppgerðina fyri skrásettar íløguognir. Marknaðarvirðið tekur útgangsstøði í íløgusamansetingini tann 31. desember í frágreiðingarárinum.

Hagtølini hjá fyritøkunum verða gjørd upp leypandi, og størsti parturin av teimum fráboðaðu $CO_2$e-útlátunum hava eina seinking á umleið eitt ár.

Tøku dáturnar eru upproknaðar út frá samlaða virðinum av skrásettum altjóða partabrøvum.

$CO_2$e-útlát = ∑ Virðið á íløguni / Virðið á fyritøkuni (EVIC) * Fyritøkurnar útlát (vav 1 og vav 2)
$CO_2$e-fótaspor = ∑ $CO_2$e útlát / Aktuelt marknaðarvirði av samlaðu íløgunum í skrásettum altjóða partabrøvum í mió. DKK

## $CO_2$e-intensitetur

$CO_2$-intensiteturin verður roknaður sum samlaða vakstrarhúsgassútlát (Vav 1 og Vav 2) í tons $CO_2$e býtt við nettoinntøkur. Í staðin fyri nettoinntøku, hava vit valt at brúka tryggingargjøld fyri egna rokning (bruttoinngjøld frátrekt endurtryggingargjøld), tí pensjónsvinnan ikki brúkar hugtakið "nettoinngjøld".

Tryggingargjøldini fevna um tryggingargjøld í P/F Tryggingarfelagnum LÍV og P/F LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag.

Frymil: $CO_2$e-intensitetur = [$CO_2$e útlát (vav 1 og vav 2) / Tryggingargjøld fyri egna rokning í mEUR].

## Orkunýtsla

Ein fyritøka kann brúka orku frá fleiri ymiskum keldum, sum t.d. brennievni, ravmagn, jarðhita o.s.fr. At brúka orkuna meira gagnligt og at brúka eina blanding av varandi orkukeldum er týðandi fyri stríðið ímóti veðurlagsbroytingum og fyri at minka um kolevnisslóðina hjá fyritøkuni.

Orka er, sum útlát, vanliga útroknað sum nýtsla faldað við umrokningarfaktorum. Brúkta orkan er íroknað bæði frá vavi 1 og vavi 2.

Frymil:
[(Nýtsla av brennievnum [L] * orkufaktor [MWh/L]) + (Elnýtsla [MWh] + fjarhitanýtsla [MWh])].
Verður roknað við føroyska $CO_2$-roknaranum.

## Varandi orka

Hetta lyklatalið vísir, hvussu stórur partur av orkuni, sum verður brúktur, er frá varandi orkukeldum. Í Føroyum ger Elfelagið SEV eina uppgerð yvir, hvussu býtið av varandi orku er.

Frymil: Varandi orkubýtið = (Varandi orkukeldur/ samlað orkunýtsla) * 100

## Ársverk

Ársverk lýsir samlaðu arbeiðsmegina í fulltíðarstørvum (FTE). Ársverkini eru gjørd upp mánaðarliga eftir setanarbrøki, og eftir hesum roknihátti kann eitt starvsfólk í mesta lagi hava 1 ársverk. Frávera ella yvirtíð ávirka ikki setanarbrøkin. Uppgerðin tekur hædd fyri broytingum í starvsfólkatalinum í árinum, soleiðis at ársverkini endurspegla samlaða arbeiðsmegina hjá felagnum í frágreiðingarárinum.

Talið umfatar bert starvsfólk við setanarskrivi.

## Kynsbýti

Kynsbýti er roknað við útgangsstøði í tal av løntakarum, og lýsir prosenttalið av kvinnum í starvsfólkahópinum. Kynsbýti á leiðslustigi er íroknað leiðarar við starvsfólkaábyrgd.

Frymil: Kynsbýti = (tal av kvinnuligum løntakarum / tal av løntakarum) * 100
Kynsbýti í leiðslu = (tal av kvinnuligum leiðarum / tal av leiðarum) * 100
Kynsbýti í nevnd = ((Valdar kvinnur í nevnd)/(tal av nevndarlimum)) * 100

## Starvsfólkaskifti

Starvsfólkaskifti verður útroknað við bæði sjálvráddari og ikki sjálvráddari fráfaring. Talið umfatar bert starvsfólk við setanarskrivi.

Frymil: Starvsfólkaskifti = (tal av fráfarnum løntakarum / tal av løntakarum) * 100

## Sjúkrafrávera

Talið av øllum arbeiðsdøgum, har starvsfólk eru sjúk og ikki til arbeiðis, í mun til talið av ársverkum. Talið umfatar alla sjúkrafráveru - eisini longri sjúkrameldingar. Barnsburðarfarloyvi og frávera, har starvsfólk eru heima við sjúkum barni, verður ikki íroknað.

Frymil: Sjúkradagar = (Talið av sjúkradøgum fyri øll ársverk fyri tíðarskeiðið)/(Ársverk).

## Arbeiðsóhapp

Eitt arbeiðsóhapp er ein brádlig hending, sum hendir í sambandi við arbeiðið og førir til, at ein persónur fær likamligan ella sálarligan skaða. Talið verður uppgjørt sum tal av arbeiðsóhappum.

### Frekvensur av arbeiðsóhappum

Talið vísir, hvussu nógv arbeiðsóhapp eru árliga pr. 100 fulltíðarsett starvsfólk. Fyri at tryggja samsvar, verður útrokningin grundað á eina felags evropeiska fatan, har eitt fulltíðarár svarar til 2.000 arbeiðstímar. Av tí at samtakið hevur avmarkað starvsfólkatal, kunnu einstøk arbeiðsóhapp hava lutfalsliga stóra ávirkan á frekvensin í einstøkum árum.

Frymil: Frekvensur av arbeiðsóhappum = [(Tal av arbeiðsóhappum / Samlaða talið av arbeiðstímum fyri øll starvsfólk) × 200.000]

## Starvsfólk umfevnd av kollektivum sáttmála

Fevnir um starvsfólk, sum eru limir í fakfelag og tey, sum ikki eru limir, men kortini eru sett sambært sáttmála. Starvsfólk telja við, um setanartreytirnar í minsta lagi samsvara við sáttmálan.

Frymil: Starvsfólk umfevnd av kollektivum sáttmála = [løntakarar settir sambært kollektivum sáttmála / miðal tal av løntakarum í árinum * 100%].

## Lønarmunur ímillum kyn

Orsøkin til lønarmunin ímillum kyn er bygnaðarlig, og viðvíkur muni í arbeiðisøki, útbúgvingarstigi og arbeiðisroyndum. Lyklatalið fyri munin í prosentum í løn millum kvinnulig og mannlig starvsfólk fevnir um meginregluna um javnstøðu millum kynini, sum ásetur javna løn fyri javnt arbeiði. Prosenttalið vísir, hvussu nógv lægri ella hægri miðallønin hjá kvinnum er, tá samanborið verður við miðallønina hjá monnum.

Miðalbruttotímalønin er tann árliga bruttolønin at býta við miðal tal av arbeiddum tímum um árið.

Frymil: Lønarmunur millum kyn = [(Miðalbruttotímalønin fyri menn – miðalbruttotímalønin fyri kvinnur) / miðalbruttotímalønin fyri menn * 100%]

Ein útrokning er eisini gjørd við at brúka median løn heldur enn miðalløn, fyri at minka um skeivleikan av sera høgum ella sera lágum lønum.

Frymil: Lønarmunur millum kyn (median) = [Mediantímalønin fyri menn / mediantímalønin fyri kvinnur]

## Útbúgvingartímar

Útbúgvingartímar verða uppgjørdir sum tal av útbúgvingartímum hjá kvinnum/monnum býtt við talinum av kvinnuligum/mannligum løntakarum. Í uppgerðini innganga útbúgvingartímar, har starvsfólk taka útbúgving ella luttaka á skeiðum í arbeiðstíð. Hetta umfatar formella útbúgving og faklig skeið, sum verða tikin í samstarvi við felagið og hava til endamáls at styrkja førleikar, sum eru viðkomandi fyri arbeiðið.

Frymil:
Miðal útbúgvingartímar menn = [Tal av útbúgvingartímum hjá monnum / Tal av mannligum løntakarum].

Miðal útbúgvingartímar kvinnur = [Tal av útbúgvingartímum hjá kvinnum / Tal av kvinnuligum løntakarum].

## Uppmøting til nevndarfundir

Lyklatalið mátar virksemið hjá nevndarlimum.

Frymil: Uppmøting til nevndarfundir = ((Tal av nevndarfundum fyri hvønn nevndarlim)/(Tal av nevndarfundum * Tal av nevndarlimum)) * 100.

# Váttan frá óheftum grannskoðara

Til áhugabólkarnar hjá P/F Tryggingarfelagið LÍV.

### Niðurstøða við avmarkaðari vissu um burðardygdarfrágreiðing

Vit hava gjørt eina váttanaruppgávu við avmarkaðari vissu til frágreiðingina um burðardygd hjá P/F Tryggingarfelagið LÍV samtakinum eins og lýst í burðardygdarfrágreiðingini síðu 22-23, fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025.

Grundað á okkara arbeiði og skjalprógv, ið vit hava fingið, eru vit ikki komin fram á viðurskifti ið geva okkum orsøk at halda, at frágreiðingin um burðardygd ikki í øllum týðandi lutum er gjørd í samsvari við §99a í ársroknskaparlógini, umframt at hon:

- Lýkur krøvini í EFRAG Voluntary Sustainability Reporting Standard for non-listed SMEs (VSME) basic module, íroknað tað av leiðsluni gjørda arbeiði fyri at eyðmerkja tær upplýsingar, sum frágreiðingin snýr seg um.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava gjørt okkara váttan við avmarkaðari vissu samsvarandi ásetingunum í ISAE 3000 (dagført) Aðrar váttanir við vissu enn grannskoðan og gjøgnumgongd av søguligum fíggjarligum upplýsingum ("ISAE 3000 (dagførd)") og øðrum krøvum galdandi í Føroyum.

Arbeiðið í sambandi við at gera eina váttan við avmarkaðari vissu er minni í vavi enn arbeiði í sambandi við grundaða vissu, bæði viðvíkjandi arbeiði í sambandi við meting av váðum, íroknað fatan av innanhýsis eftirlitinum og tað, sum er gjørt grundað á metta váðan. Sostatt er stigið fyri vissu, sum verður fingið í sambandi við eina uppgávu við avmarkaðari vissu, væl lægri enn vissan, sum hevði verið fingin, um talan var um eina uppgávu við grundaðari vissu.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi prógv, ið kunnu verða grundarlag undir okkara niðurstøðu. Okkara ábyrgd sambært hesum er nærri lýst í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans".

### Óheftni og góðskustýring

Vit eru óheft av LÍV samtakinum  samsvarandi reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) um etiskan atburð hjá grannskoðarum og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava hildið etisku skyldurnar sambært hesum krøvum, og IESBA Code.

P/F Januar, løggilt grannskoðaravirkið er fevnt av altjóða standardum um góðskustýring, ISQM 1, sum krevur, at vit seta í verk og nýta eina góðskustýringskipan, sum millum annað umfatar skjalprógvaðar leiðreglur og virkisgongdir um at halda tey etisku krøvini, yrkisligar standardir og galdandi krøv sambært lóg og øðrum ásetingum.

### Áherðsla av viðurskiftum viðvíkjandi váttanaruppgávuni

Samanberingartølini í burðardygdarfrágreiðingini fyri LÍV samtakinum fyri roknskaparárið 1. Januar – 31. desember 2024 og eldri eru ikki umfatað av váttanaruppgávuni. Okkara niðurstøða er ikki broytt í hesum sambandi.

### Ábyrgd leiðslunnar

Leiðslan hevur ábyrgd av at leggja til rættis og seta í verk eina mannagongd við tí endamáli at eyðmerkja tær upplýsingar, ið eru givnar í frágreiðingini um burðardygd, og at upplýsa um hesa mannagongd í burðardygdar frágreiðingini 2025. Hendan ábyrgd fevnir um:

- eina fatan av, hvussu virksemi og vinnulig sambond hjá LÍV samtakinum virka og fáa eina fatan av teimum áhugapørtum, ið ávirkast av hesum.
- at eyðmerkja veruliga og møguliga ávirkan (bæði negativa og positiva) í mun til burðardygdarviðurskifti umframt váðar og møguleikar, sum hava ávirkan á ella kunnu væntast at hava ávirkan á fíggjarstøðuna hjá JLÍV samtakinum, fíggjarligu støðuni, roknskaparliga úrslitið, peningastreymin, atgongd til fígging ella fíggjarkostnaðir í stutt, miðal og longri tíðarskeið.
- at meta um týdningin av eyðmerktu ávirkanunum, váðunum og møguleikunum í mun til burðardygdarviðurskifti við at velja og nýta hóskandi stig av týdningi.
- Virðisáseting og rapportering av upplýsingum í burðardygdarfrágreiðingini grundað á roknskaparháttin, og
- at áseta fortreytir, sum eru rímiligar í mun til umstøðunum.

Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av at gera frágreiðingina um burðardygd samsvarandi §99a í ársroknskaparlógini íroknað:

- fylgja ásetingum í ESRS,
- at leggja til rættis, implementera og uppræatthalda tær innanhýsis mannagongdirnar, sum leiðslan metir verða neyðugar til at framleiða eina burðardygdarfrágreiðing uttan týðandi feilir, uttan mun til um hesir eru tilvitaðar, ella ótilvitaðir, og

- at velja og brúka hóskandi hættir til frágreiðingina um burðardygd og at áseta treytir og til at gera metingar, sum eru rímiligar eftir umstøðunum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er at leggja til rættis og gera eina váttanaruppgávu við tí endamáli at fáa eina avmarkaða vissu fyri, at frágreiðingin um burðardygd er uttan týðandi feilir, uttan mun til um hesar eru tilvitaðar ella ótilvitaðar, og geva eina váttan við avmarkaðari vissu við okkara niðurstøðu.

Feilupplýsingar kunnu standast av sviki ella feilum og verða mettir týðandi, um tað er sannlíkt, at tær hvør í sínum lag, ella samlað, hava ávirkan á tær avgerðir, sum brúkararnir grunda sínar avgerðir á í frágreiðingini um burðardygd í síni heild.

Sum partur av arbeiðinum við at geva eina váttan við avmarkaðari vissu, ið verður gjørd samsvarandi ISAE 3000 (dagførd), gera vit fakligar metingar og hava eitt yrkisligt ivasemi meðan vit arbeiða.

Okkara ábyrgd viðvíkjandi arbeiðinum umfatar:

- at fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, tó ikki við tí endamáli at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er, íroknað úrslitið av innanhýsis eftirlitinum,

- at meta um, hvørt tær upplýsingar, ið eru eyðmerktar, eru í samsvari við tann av "EFRAG Voluntary Sustainability Reporting Standard for non-listed SMEs" (VSME) ásetta roknskaparhátti, og

- at leggja til rættis og meta um, hvørt innanhýsis mannagongdirnar eru samsvarandi lýsingini hjá felagnum.

Okkara ábyrgd í sambandi við frágreiðingina um burðardygd fevnir eisini um:

- at eyðmerkja upplýsingar, har sannlíkt er, at týðandi skeivleikar kunnu standast av sviki ella feilum, og

- sum miða móti upplýsingum í frágreiðingini, har tað er sannlíkt, at týðandi feilupplýsingar kunnu verða. Vandin fyri ikki at avdúka týðandi upplýsingar orsakað av sviki er størri, enn tá talan er um týðandi skeivar upplýsingar orsakað av feilum, av tí at svik kann fevna um samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaða burturlegging, villeiðandi upplýsingar, ella at innanhýsis eftirlitið verður skúgvað til síðis.

## Samanumtøka av gjørda arbeiðinum

Arbeiðið í sambandi við eina váttan við avmarkaðari vissu fevnir um at fáa skjalprógv fyri frágreiðingini um burðardygd.

Vavið, hvat slag av arbeiði og tíðarætlan fyri ætlaða arbeiðið er treytað av fakligari meting, íroknað eyðmerking av upplýsingum, har tað er sannlíkt, at týðandi feilir kunnu stinga seg upp í frágreiðingini um burðardygd, óansæð um hesir skyldast sviki ella feili.

Í sambandi við okkara váttan við avmarkaðari vissu hava vit viðvíkjandi innanhýsis eftirlitinum:

- fingið eina fatan av innanhýsis eftirlitinum við at seta spurningar fyri at skilja grundarlagið undir teimum upplýsingunum, sum leiðslan nýtir, og við at gjøgnumganga innanhýsis skjalprógv av teirra innanhýsis eftirliti; og

- gjørt eina meting av, hvørt tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið í sambandi við arbeiðið av innanhýsis eftirlitinum, sum felagið hevur sett í verk, er í samsvari við ásetingarnar hjá "EFRAG Voluntary Sustainability Reporting Standard for non-listed SMEs (VSME)".

Í sambandi við okkara arbeiði við váttanini við avmarkaðari vissu hava vit víðvíkjandi frágreiðingini um burðardygd:

- fingið eina fatan av mannagongdum hjá LÍV samtakinum, ið eru viðkomandi fyri at gera frágreiðing um burðardygd við at fáa eina fatan av innanhýsis umhvørvinum, mannagongdum og skipanum hjá samtakinum, ið eru viðkomandi fyri frágreiðingina, tó uttan at gera eina ítøkiliga meting, hvussu innanhýsis mannagongdirnar virka, fáa skjalprógv fyri at hesar eru sett í verk ella royna, hvussu tær virka.

- mett um týðandi upplýsingar, ið eru eyðmerktar í innanhýsis eftirlitinum, eru við í frágreiðingini um burðardygd og í samsvari við ESRS.

- sett viðkomandi starvsfólkum fyrispurningar og gjørt greinandi arbeiði viðvíkjandi útvaldum upplýsingum í frágreiðingini um burðardygd.

- gjørt ítøkiligt arbeiði í mun til útvaldar upplýsingar í frágreiðingini um burðardygd.

- mett um hættir, treytir og upplýsingar til at gera týðandi metingar og framtíðar upplýsingar og, hvussu hesir hættir eru nýttir.

- har tað hevur verið viðkomandi, hava vit samanhildið útvaldar upplýsingar í burðardygdar frágreiðingini við upplýsingar í ársroknskapinum og leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 21. apríl 2026

**P/F Januar**
løggilt grannskoðaravirki

Óli Joensen
statsautoriseret revisor

**Tryggingarfelagið LÍV**
Óðinshædd 11, 100 Tórshavn
+298 311111
www.liv.fo
liv@liv.fo
@livstrygging

**LÍV er høvuðsstuðul hjá:**

Rescue LÍV

Bókaklubbin til føroyingar

Vitjunartænastan hjá Reyða Krossi